# Jólamaðurin uttan vinnubræv

LINJOHN CHRISTIANSEN
skipari



Nú er nakað síðani, hann fór um sýnina, altíð positivur og trúgvur móti sínum. Líkamikið um tíðirnar eru góðar ella minni góðar; ein pakki verður tað altíð. Hann hevur altíð eina loysn, og er royndur á økinum - Teoretisk vitan, royndar vitan og síðani vísdómur.

Samgonguni er onki galið við. Trupulleikin er, at uppgávan er ov stór.

Fleiri serfrøðingar hava staðið frammi um høgtíðina. Spell, at so lítið positivt er komið fram. Bert krittikkur uttan loysnir. Hinvegin, orðini hjá Bispi, um at hugsa positivt kunnu loysa nógv negativt, eru vísdómur.

Tá vísmennirnir velja at siga, at neyðugt er vid bygnaðarbroytingum uttan at siga meira, kundu teir eins væl sagt jarðskjálvti. Vit burdu væntað okkum meira av fólki við so góðum útbúgvingum. Tað ljóðar sum bert orðaspæl fyri onki skeivt at siga. Samfelagið hevur goldið útbúgvingina, bjóðað teimum heimaftur og sett tey í góð størv. Hetta er alt gjørt við tí fyri eyga, at nýtímansgera okkara samfelag øllum at gagni. Tí er slíkt uttanumtos spell. Vit luttaka øll í kreppuni.

At hækka skattin ella minka útreiðslurnar er onki svar. Hvat loyvir pengapungurin hjá fólki? Loyvir hann tí ikki, kemur ongin króna inn og avgjøldini minka í sama mun.

Eitt annað, ið fekk meg at stúrsa við ein dagin, var ein dagin, gott nokk vóru tíðirnar betur, at samfelagið væl toldi at flotin kundi leggjast nøkur ár – Halló!, 95 % av okkara útflutningsvirði kemur úr havinum. Hvat fyri lyklarhol verður hugt ígjøgnum?

**Bygnaðarbroytingar**
Ongar bygnaðarbroytingar higartil bera brá av effektiviteti, smidligheid ella at bíligari, heldur tvørtur í móti:

1. Barnaansingarøkið, ið lagd varð til kommunurnar vaks frá eini útreiðslu á 10% til í dag at liggja millum 20% -30%
2. Eldraøkið verður útbygt eftir einum leisti, ið er sera sera kostnaðarmikil. Ein skipan, sum onnur lond ganga burtur frá
3. Kommunuálitið hevur tikið 20 ár. Hetta er long tíd sæð í ljósinum av, at tað tók bert sjey dagar at skapa allan heimin. At hava 5, 7 ella 8 mikroeindir fyri at spæla stórur er ongin sparing. Tann komandi útjavningin kann skjótt svinna í meiri útreiðslum. Var barnaansingarøkið stórt at leggja til kommununar, verður eldraøkið mangt slíkt. Tí er umráðandi, at kommunurnar - stórar sum smáar - verða við í allari tilgongdini. Tey gomlu skulu øll hava ein virðiligan aldurdóm, tí vit eru bert stór, tí vit standa á teirra herðum.
4. Nýggja fólkaskúlalógin verður nú aftur reviderað, men hesaferð eftir Sudoko-modellinum. Krónurnar skulu passa bæði uppeftir og tvørturum. Hini virðini, t.e. ymiskleikin, barnið, heimið og bygdarskúlin telja minni - øll skulu í stóra pott. **Í dag er næstan ógjørligt at síggja mun millum eina vanliga blómu og einari úr plastikk. Munurin er sjálvsagt stórur, onnur hevur rót og hin ikki. Rótin ger, at blóman mennist og verður sterk at standa ímóti tá stormarnir ýla - eitt gott støði. Plastikkblóman hevur ikki fingið hendan so týðandi møguleika at standa ímóti við, men verður happað av hvørjum vindblaki.** Eg eftirlýsi tey sunnu virðini, kærleikan, trygdina, tíðin at vakna, tey fyrstu fetini, bygdarskúlan og heimið. Eitt trygt og gott støði at standa á, har mótburður kann blíva til menning.

Hvat er hetta fyri ein ný-føroyingur vit leita eftir, modell stóri pottur? Hava smáu bygdarskúlarnir ikki ment nógvar tungvektarar á øllum økjum í samfelagnum?

**Nýggj skattaskipan**
Nú skriftin sæst á vegginum, at neyðugt er við einum bíligari samfelagi, er gott høvi tvørpolitiskt at finna fram til eina nýggja, einfaldari og føroyska skattaskipan. Skattaskipanin skal vera eitt lokomotiv, har tú kann
1) *Forvinna tað tú vil*
2) *Verja tey lágløntu*
3) *Niðurlaga rentustuðulin og*
4) *Hágmark fyri inngjald av eftirlønum.*

1. Eitt fast skattaprocent uttan mun til inntøku á 34% ella 38%, alt eftir hvussu vit niðurlaga rentustuðulin.
2. Allir løntakarar fáa ein mánaðarligan botnfrádrátt á 5.500,- kr, og við hesum verða grundupphæddirnar av fólkapensiónini og samhaldfasti ikki skattað.
3. Um rentustuðulin verður burtur eftir tveimum árum, verður skattaprosentið 34, og eftir 15 árum 38%.
4. Hágmark fyri inngjaldi av eftirlønum 4.000,- kr um mánaðin.

*This is a non-profit organisation – please help us change!*

**Hýsan og grindin**
Lítið hjálpti tað, um navnið var Paul McCartney, Paul Watson ella Greenpeace. Fjøldin Føroyar stóð øll saman og vardi borg, tá útheimurin royndi at gera seg inn á okkara grindadráp. Vit vunnu so ruddiliga.

Verri er við hýsuni. Innanhýsis klandur og stríð, briks og kall um vánaligan fiskivinnupolitikk, vánaliga fiskidagaskipan, ov høgt veiðutrýst, vánaliga tilgongd, ikki burðardygt og nógv nógv annað. Hevði tað bert verið hjá okkum sjálvum – Well! Verri er tá farið verður út um landoddarnar at standa á altjóða pallinum og gita um fisk, har alt tað negativa kemur av mannaávum. Úrslitið kenna vit. Kundin vendir føroysku hýsuni bakið. Tí er alneyðugt at standa saman og verja borg, júst sum við grindamálinum.

Eitt hugskot er at koyra Havstovuna undir Bisp. Jógvan Fríðriksson er vísur, semjusøkjandi og hevur royndir. Mangan fløkustampin hevur hann eisini greitt sárhentur. Eitt er givið – politiska skipanin, vinnan og havfrøðin mugu ganga hond í hond. Ella endar tað sum hjá falli Romverja. Hvør er tá betur enn Bispur?

Heildin er størri enn summin av teimum ymisku deildunum.

**Niðurstøða**
Tað vildi verið utopi at ímynda sær, at ein næmingur frá Vinnuháskúlanum, ið júst hevði fingið prógv sum skipsførari uttan siglingstíð, hevði fingið starv á ovastu rók á Oasis of the Seas. Vinnubrævið loyvir tí ikki, hetta krevir royndarvitan. Vinnubrævið sigur, hvar á menningarstiganum byrjast skal.

Skifta vit Vinnuháskúlan út við RUC, CBS ella Oxford Brooks, tá er ikki neyðugt við nøkrum vinnubrævi, teoriin er nokk.

Seti mær ofta spurningin eru vit roynd ella vís nokk at gera bygnaðarbroytingar, ið samsvara einum mikrolandi mitt úti í Atlantshavinum - blívur tað ikki bert til Yvirbygnadarbroytingar?

Um eitt lítið ár so dagar hann undan aftur, kósin tann sama beint á takið og niður gjøgnum skorsteinin. Ein kundi næstan trúð, at jólamaðurin var uppvaksin á Oyrasundskollegienum.

*Umborð á Akamalik, ávegis til Nuuk at skifta fólk*

# Somu møguleikar fyri allar føroyingar

BIRGIR MOHR
Sandi



Mær fall fyri bróstið hesi úttalilsi hjá løgtingskvinnu Javnaðarfloksins og fíggjarnevndarlimi okkara. Vøkur orð um útjavning, solidaritet, somu møguleikar fyri okkum øll til tilboðini í Tórshavn - fyrst og fremst arbeiðstilboðini. Men bert orð gera tað ikki.

Lat ein bil fara við arbeiðsfólki úr Norðoyggjum til Havnar við bilførara og øðrum. Hesin skal gjøgnum í hvussu so er tríggjar kanska fýra ella fimm tunlar og yvir eina brúgv. Kostnaðurin fyri koyring í ein mánað er 900 krónur fyri øll fimm arbeiðsfólkini í almennum taksti.

Lat sama bil fara úr Dali ella aðrastaðir úr Sandoy við fýra arbeiðsfólkum umframt bilførara. Kostnaðurin fyri koyring eftir í førum vánaligum landsvegi, har omanlop er vanligt, og har tveir bilar ikki kunnu møtast alla staðir fyri til seinast at standa á Skopunar kai í bilkø til Teistan og kanska sleppa við. Sleppur tú við tann túrin, so kostar tað fyri koyring í ein mánað 3.690 krónur bíligasta takst fyri hesi fimm.

Væl er javnað, ella hvat heldur tú Eyðgunn Samuelsen, løgtingskvinna. Eru her somu møguleikar? Nei, eg spyrji bara. Og hettar er støðan í øllum Suðurøkinum í dag,

Annars alt tað besta og við javnaðarkvøðu.

# Fáa okkara eldru eina virðiliga viðferð?

JENIS AV RANA
formaður Miðfloksins



*Hugsi um tvey ymisk øki, har rannsakandi spurnartekin eiga at verða sett við viðferðina, vit geva okkara eldru. Óivað eru fleiri slík øki, sum onnur kennast við- og kunnu lýsa betur.*

Í farnu viku vóru fíggjarligu viðurskifti pensionista okkara kunngjørd vítt og breitt. Í fjølmiðlum og á tingi varð boðað frá, hvussu nógv hesi høvdu eftir, tá vanligi skatturin var goldin og tá ætlaði eykaskatturin til sambýlisbúgvar, tær tveytúsund krónurnar hjá Rósu og samgonguni, var ognartikin til landskassan.

Síðani hesar kunngerðir havi eg bíðað eftir framhaldinum. Bíðað eftir at hoyra hvussu nógv aðrir samfelgsbólkar hava at gera gott við, eftir at skattur v.m. er goldin. Hvussu nógv ber til at ognartaka frá øðrum, t.d. løgtingsmonnum, advokatum, læknum, privatum- og almennum stjórum, skiparum, landsstýrismonnum, lærarum- fyri bert at nevna nøkur, áðrenn hungursmark teirra er nátt. Men ikki eitt orð hoyrist, ikki eitt skriv sæst. Eri farin at hugsa, um so galið man vera vorðið, at man bert ætlar at heingja fíggjarviðurskifti teirra á niðastu rók út til almenna skoðan?

Er nøkur orsøk at almannakunngera hvussu nógv fólk hava eftir, tá skattur, húsaleiga og matur eru goldin, so má hetta væl galda fyri øll, og ikki bert tey veikastu? Er hetta ein nýggjur háttur at krevja skatt frá fólki uppá, fyrst at finna útav hvat tey tola at missa, so má tað væl galda fyri øll? Og er hetta ein nýggjur háttur hjá samgonguni at vinna tann pening, ið manglar, so kann hesin háttur væl nýtast móti øllum- ella?

Væl veit eg, at tá fyrra ABC samgongan gav 380 mió. árliga í skattalætta í samfull 4 ár, so fór eingin av hesum krónum á niðastu røkur, tá kendu teir bert adressurnar á øðru rókum. Men kendu teir tær tá, máttu teir kent tær enn. Nú hesin peningurin manglar burdi heilt náttúrligt verið, at ABC 2 sendi rokningina til hesar somu røkur og adressur, og ikki til tey, ið ongan skattalætta fingu!

Sama ólíka viðferð í spurninginum um t.d. eldrabústaðir?

Vanligt er, tá vit søkja um eitthvørt, inn á skúlar, í barnaansing, eftir grundøkjum o.l. , at vit fáa at vita, hvar á bíðilistanum vit eru. Á hendan hátt kunnu vit fylgja við, og fáa kunning um hvar á listan eg eri náddur, so hvørt broytingar verða gjørdar. Men hvussu er við teimum eldru, teimum, ið eru uppskrivaði til eldrabústaðir, tvs. røktarheim, ellisheim, sambýli v.m. Hvussu síggja hesir listar út, og hvusu lætt er hjá teimum, sum í mongum førðum liggja heima og leingjast eftir virðiligum umstøðum, at fáa innlit í hesar. Hvussu er kunningin til tey og teirra skipað, hvussu kunna tey seg um broytingar, so hvørt líkindi teirra at fáa eitt pláss broytist?

" Vit ringja og ringja, skriva og meyla, men ikki ein gang eina váttan um at fyrispurningar okkara eru móttiknir, tíansheldur eitt svar um hvussu útlitini eru, fáa vit". Soleiðis siga avarandi aftur og aftur um royndir sínar at fáa kunnleika um støðu teirra eldru á hesum listum. Hetta fær meg enn einaferð at spyrja einfalda spurningin, um viðferðin okkara eldru fáa er virðilig, og hví hon er øðrvísi enn annara. Talan er jú um aldursbólkin, sum hevur grundað vælferðarsamfelagið, sum tú og eg hvønn dag njóta gott av.

Minsta tøkkin til teirra átti at verið ein virðilig viðferð á ellisárum.

